Filmur

# Náttarvørðurin á fornminnissavninum

## Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

**- Nat på museet við Ben Stiller er ein nøkunlunda skemtifilmur**





Hesin filmurin er eitt ordans brak innan aktion-ævintýr/komediufilmsslagið. Filmurin Nat på Museet, ið verður sýndur í Havnar Bio í hesum døgum er ein av teim mest seljandi filmunum í USA, men hann er heldur ójavnur.

Hann snýr seg um Larry Daley (Ben Stiller), sum er ein dagdroymari og ein tapari. Hann er ein av hesum ævigu uppfinnarunum, ið ongan vegin koma við nøkrum. Hugskotini fáa ongantíð veingir hjá honum. Larry er noyddur til at verða realistiskur og finna sær eitt vanligt arbeiði, tí annars fær hann ikki loyvi til at síggja son sín. Móti sínum vilja, søkir hann starv á Náttúrusøguliga Forngripasavninum í New York. Her arbeiða nakrir gamlir menn, ið verða leiktir av teimum kendu seniorunum Dick Van Dyke, Mickey Rooney og Bill Cobbs.

Hann fær einki at vita sum so, fær bert eina lummalykt og skal so ganga sjálvur á tóma veldiga Forngripasavninum í New York um næturnar.

Her er alt møguligt, frá stórum Tyrannosaurus Rex beinagrindum til standmyndir av steinaldarfólkum, idnianarum og hunnarakonginum Atilla. Her er amerikanska borgarakríggi og antikka Rom. Tað sum Larry ikki veit, er at tá tað gerst myrkt, livna øll hesi djór og fólk frá fortíðini.

Tað er neyðugt at góðtaka hesa søguna, fyri at kunna njóta hana. Tað er t. d. Teddy Roosevelt (Robin Williams), sum kann hjálpa honum at yvirliva um náttina. Og ein dynosaurur rennur eftir honum, ella tað vil siga beinagrindin av einum slíkum.



### Ein barnabók

Hugskotið til filmin stavar frá einari barnabók, fortald og teknað av kroatanum Milan Trenc. Filmsfelagið Fox hevur keypt rættindini og hesi settu filmleikritahøvundar at arbeiða við søguni. Hesir eru Chris Columbus, Michael Barnathan og Mark Radcliffe frá 1492 Pictures, ið eisini hava framleitt Harry Potter-røðina.

Tað er Shawn Levy, ið hevur leikstjórnað filminum. Hann er kendur fyri filmar sum Big Fat Liar (2002), Just Married (2003), Cheaper by the Dozen og The Pink Panther (2006) – hesir seinastu høvdu Steve Martin við sum høvuðsleikara, men vóru sera vánaligir.

### Kendir leikarar

Ben Stiller er ein góður leikari annars. Hann kom fram í filminum hjá Steven Spielbergs Empire of the Sun (Solens rige, 1987), men fekk ikki eitt gjøgnumbrot fyrr enn í filmum sum The Cable Guy og ikki minst There's Something About Mary (Vild med Mary, 1998). Hann er ein heldur løgin leikari og skemtari, sum vit sóu í Meet the Fockers í 2004 og ikki minst í filminum hjá Wes Andersons The Royal Tenenbaums (2002). Hann spælir væl í hesum filminum, men hvørki hann ella nakar annar kann bjarga hesum filminum frá at neyðlenda og missa ondina.

At filmurin hevur eitt so sera kent oldboyslið er eisini fínt. Teir tríggir Dick Van Dyke, Mickey Roonet og Bill Cobbs er allir sera kendir og hava fyri langari tíð síðani skrivað seg inn í filmsøguna.

Robin Williams er eisini við. Hann er ein kendur og ójavnur leikari. Onkuntíð spælir hann við í óførum filmum sum Good Will Hunting, The World According to Garp, Good Morning Vietnam og ikki minst í Dead Poets Society (Døde poeters klub, 1989), men hann hevur eisini spælt við í óendaliga vánaligum filmum, so sum Hook, Robots, Death to Smoochy, Flubber v.fl.

Eingin kann til endans bjarga hesum filminum frá, bert at vera flott og heldur tómt, men væl gjørt undirhald.

2 stjørnur av 6

## Fakta um Nat på museet

**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| Larry Daley | BEN STILLER |
| Rebecca | CARLA GUGINO |
| Teddy Roosevelt | ROBIN WILLIAMS |
| Cecil | DICK VAN DYKE |
| Gus | MICKEY ROONEY |
| Reginald | BILL COBBS |
| Nick Daley | JAKE CHERRY |
| Dr. McPhee | RICKY GERVAIS |
| Erica Daley | KIM RAVER |
| Octavius | STEVE COOGAN |
| Sacajawea | MIZUO PECK |
| Attila PATRICK | GALLAGHER |

Leikstjórn Shawn Levy. Aldursmark 7 ár. Frumframførdur í Havnar Bio frá 9. februar 2007.